# B36 tveitt úr 2 deild

- Av tí, at 2. deildarliðið hjá B36 ikki hevur møtt til fleiri dystir í landskappingini 2008, hevur Kappingarnevndin á fundi tikið avgerð um at koyra B36 úr kappingini hjá 2. deild hjá monnum. Soleiðis skrivar heimasíðan hjá Fótbóltssambandinum. Árstalsfelagið er ikki møtt til tríggjar av teimum seks útidystinum, sum teir eftir skránni skuldi havt spælt. Hetta fær nú avleiðingar, og B36 sleppur ikki longur at luttaka í kappingini. Allir dystir og mál sum eru leiktir móti B36 verða tískil strikaðir.



# Niclas í barónaseingini

Onkursvegna høvdu starvsfólkini á Hotel Hyat, har fótbóltslandsliðið býr, ikki fingið greiðu á, hvussu nógv kømur kravdust til føroyska ferðalagið. Tá landsliðið kekkaði inn seint mikukvøldið, vóru nevnliga eingi kømur til teir báðar ferðaleiðararnar, Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen. Tað eydnaðist at rigga eitt av vanligu kømurunum til, soleiðis at Karl Vidtfeldt fekk sovið har, men einki vanligt kamar var tókt til Niclas Davidsen. Song skuldi hann kortini fáa, og endin av hesum varð, at Niclas fekk eina rimmar suitu til sín sjálvs. So hesar dagarnar í Beograd kann av røttum sigast, at Niclas man hava tað sum Jeppe á sinni, tá hesin var í barónaseingini. So er spurningurin, hvussu leingi Niclas verður har...

# Ov nógvir dystir á rað

**Landsliðsspælarar fáa ov lítla hvíld, og hetta kann vera ein orsøk til mongu skaðarnar, sum støðugt raka hópin. Ein loysn kundi verið, um størri fyrilit varð tikið fyri hesum, tá kappingin verður løgd, heldur Álvur Hansen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av teimum, sum hevði sínar viðmerkingar, tá føroyska kappingin fyri skjótt fýra árum síðani varð longd til at fevna um 27 umfør, var Petur Simonsen, sum í nógv ár hevur virkað sum venjari.

Hóast hann eisini dugdi at síggja fyrimunir, so hevði hann síni fyrivarni, og eitt av hesum var, at tað kom at krevja heilt øðrvísi venjingar. Fyrst og fremst tí hann metti strævnu skránna við fleiri miðvikudystum krevja meira hvíld og í aðrar mátar ein øðrvísi dosering av venjingunum.



*Tað er eingin orsøk, at somikið nógvir mikudagsdystir eru í august mánaði, tá vit vita, at landsliðið eisini hevur eina strævna skrá, heldur Álvur Hansen*

Mynd: Alexandar Djorevic

## Eru slitnir

Skaðarnir, sum seinastu trý árini mest sum uttan íhald hava regnað yvir føroyska fótbóltslandsliðið, kundu eisini bent á, at ov stórar byrðar verða lagdar á bestu spælararnar, og Álvur Hansen, sum er fysioterapeutur hjá landsliðnum, og sum eisini hevur staðið A-roynd-ina sum venjari, er ikki heilt ósamdur.

- Nógvir av skaðunum eru yvirbelastningsskaðar. Serliga seinastu tíðina hava spælararnir havt øgiliga nógvar dystir. Tekur tú hópin, sum var í Portugal og nú aftur her í Serbia, so verður hetta sjeyndi dysturin hjá spælarunum í tríggjar vikur. So tað er nógv, sum bendir á, at teir fáa ov lítla hvíld, sigur Álvur Hansen.

- Spælararnir á landsliðnum eru gjarna frá teimum feløgum, sum hava spælt í europiskum høpi, og tí hava teir lítlan og ongan summarsteðg havt. Samstundis eru hetta spælarar, sum spæla 90 minuttir so at siga hvørja ferð, og í feløgunum er sjáldan ráð at seta ein landsliðsspælara á beinkin at hvíla seg, tá týdningarmiklir dystir eru.

## FSF má taka fyrilit

Tað er kanska trupult at geva beinleiðis góð ráð til heimligu venjararnar um meira hvíld til landsliðsspælarar, tí sjálvandi hugsa hesir fyrst og fremst um sítt lið.

Álvur Hansen heldur tó, at upplýsing og samskifti er ein háttur at skapa betri karmar fyri fremstu spælararnar, men hann heldur eisini, at hetta er ein trupulleiki, sum FSF kann leggja upp fyri, tá landskappingin verður løgd.

- Nú í august mánaði hava vit havt fleiri mikudagsdystir í landskappingini. Og tað er kanska eitt sindur ósmart, tá landsliðið eisini hevur eina strævna skrá um sama mundi. Har haldi eg avgjørt, at størri fyrilit kundi verið sýnt, soleiðis at mikudagsumførini heldur lógu onkra aðrastaðni í kappingarárinum, sigur Álvur Hansen.



*Jákup á Borg hevur støðugt verið ein av týdningarmestu spælarunum hjá Jógvani Martin Olsen. Seinast varð hann tó settur á beinkin, men tí støðuna vil Jákup gera alt fyri at broyta*

Mynd: Alexandar Djorovic

# Vil vinna plássið aftur

**Í Portugal varð Jákup á Borg settur á beinkin. Ein støða, sum hann ikki ynskir eina endurtøku av, nú nýggj undankapping stendur fyri framman**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Beograd, Serbia:** Ein av royndastu spælarunum í føroyska hópinum er Jákup á Borg. Í mars mánaði í 2001 varð hann settur at røkja plássi sum høgri vongverji í 3-5-2 skipanini hjá Allani Simonsen, og síðani tá hevur høgri kantur á føroyska liðnum mest sum verið ogn hjá Jákupi.

Í Portugal vóru Símun Samuelsen og Christian Høgni Jacobsen tó at síggja á hesum plássum, meðan Jákup sjálvur sat á beinkinum. Ein støða, sum spælarin beit í seg, men sum hann ikki ynskir nakra endurtøku av.

- Sjálvandi er tað ongan tíð stuttligt at vera á beinkinum, men júst tá vóru kanska aðrir spælarar, sum vóru framman fyri meg, so eitt ella annað stað klári at góðtaka tað fyri tann dystin. Men sjálvandi eri eg ikki nøgdur um ta støðuna, so eg má bara arbeiða hart og prógva, at eg eigi pláss millum teir fyrstu ellivu, sigur Jákup á Borg.

Og Serbia á útivølli er væl ikki ein dystur, sum mann hevur serliga góðan hug at vera fyriuttan?

- Sjálvandi ikki. Hetta er ein veldug uppliving, og tá tú ferðast somikið langt við hópinum, so ynskir tú sjálvandi at vera ein partur av liðnum, sum fer á vøllin. Og so mugu vit vita, um vit ikki klára at gera tað óvæntaða, sum vit so leingi hava bíðað eftir, sigur Jákup.

## Hitin verður øgiligur

Føroyska liðið ferðaðist í 15 tímar mikudagin, men hósdagin helt Jákup ikki, at hetta bilaði tað heilt stóra.

- Sjálvandi merkist tað, men ikki so heilt nógv. Nu høvdu vit eina lætta venjing í morgun, og so rokni eg við, at menn eru betur fyri. Hinvegin er hitin heilt óhugnaligur. Vit royna at fáa nóg mikið av vætu allatíðina, so vit klára tað helst. Men hóast dysturin verður spældur um kvøldið, fara hitastigini helst at liggja nær teimum 30, so tað verður strævið at koma ígjøgnum allar 90 minutirnar, sigur Jákup á Borg.